## Kappingarreglur fyri yngri deildir (ungdómsflogbólt - G/D14 - G/D16 - Unglingar)

Feløgini, ið skipa fyri ungdómskappingum, eiga at hava í huga, at tað fyrst og fremst snýr seg um spælararnar - at tað er stuttligt at spæla og kappast! Bólkarnir eiga at vera so stórir, at øll lið fáa minst tríggjar dystir - um hetta er gjørligt. Tó er tað ein treyt, at minst tvey lið í hvørjum bólki koma víðari. Feløgini, ið skipa fyri kappingunum, eiga at fáa tilmeldingar í so góðari tíð, at boð um tíðir o.a. kunnu sendast luttakandi feløgunum eina viku undan hvørjari kapping.

**Gentudeild og dreingjadeild**
Í gentudeildini leika gentur, og í dreingjadeildini leika dreingir.
Feløgini kunnu søkja starvsnevndina um undantak, so at gentur leika við á dreingjaliði og dreingir leika við á gentulið. Umsóknin skal vera ítøkilig fyri hvørt lið sær og fyri hvønn leikara sær.

Í kidsvolley lev. 0, 1, 2, og 3 kunnu gentur og dreingir leika saman.

**Vøllurin**
Spælt verður á vanligum flogbóltsvølli. Kidsvolley lev. 0, 1, 2, 3 og 4 (G/D12) leika á badmintonvølli.

**Bóltur**
Vanligur bóltur, góðkendur av FBF, verður nýttur.

**Serva**
Gentur og dreingir 14: Loyvt verður at serva yvirhondsservu frá baklinjuni og undirhondsservu 3 metur inni á vøllinum.

Gentur og dreingir 16 og unglingar serva sum í vanligum flogbólti.

**Net**

| | |
|---|---|
| Kidsvolley | Sambært Kidsvolley reglum |
| Gentur 14 | 2,14 m |
| Dreingir 14 | 2,24 m |
| Gentur 16 | 2,20 m |
| Dreingir 16 | 2,35 m |
| Kvinnuunglingar | 2,24 m |
| Mansunglingar | 2,43 m |

**Aldursbólkar** - sí grein 4 b í kappingarreglunum.